# Klarinettjól í Miðlahúsinum

Leygardagin frá kl. 15 til 18 fara klarinettnømingar á Føroya Musikkskúla at spæla jólini inn. Talan verður um spæl í smáum bólkum, sum hvør í sínum lagi koma at framføra nakað av tónleiki, sum hoyrir jólunum til.

Á skránni eru sjálvandi teir kendu og væl dámdu jólasangirnir, men fleiri onnur tónleikasløg verða eisini á skránni. Somuleiðis fara næmingar, sum venja seg á øðrum instrumentum eisini at stuðla upp undir klarinettspælið, soleiðis at talan verður um sera fjølbroytta framførslu.

Meðan spælt verður, borðreiða foreldur hjá næmingum við onkrum góðum jólabakstri og onkrum heitum at drekka.

Tað er Føroya Klarinettorkestur, sum skipar fyri tiltakinum. Orkestrið ætlar sær komandi ár til Álands at hava nakrar framførslur.



























